Visit Faroe Islands
Official Tourist Board of the Faroe Islands

Tórshavn, 21. februar 2023

Hoyringssvar ísv. uppskot til løgtingslóg um talgilt samleikakort

Visit Faroe Islands takkar fyri høvi at lata viðmerkingar til lógaruppskotið.

Endamálið við lógaruppskotinum er at geva talgilda samleikakortinum, ið nú verður ment sum partur av talgilda samleikanum, neyðuga løgfrøðiliga grundstøði at virka á.

Visit Faroe Islands hevur ongar viðmerkingar til sjálvar lógarásetingarnar í uppskotinum, ið eru rættiliga formligar/tekniskar av natúr.

Tá Visit Faroe Islands verður mett at vera viðkomandi hoyringspartur ísv. lógaruppskotið, so hevur tað ivaleyst við ætlaða nýtsluøkið at gera og her reisa seg beinanvegin fleiri spurningar av prinsipiellum slagi, sum ikki verða umrøddir í lógaruppskotinum og sum vit meta vera neyðugir at hava í huga, tá samleikakortið fer at vera tikið í nýtslu.

Lógaruppskotið vísir á, at tørvur er á einum talgildum samleikaprógvi, m.a. so ein lættari kann geva seg til kennar, tá ein ynskir atgongd til almennar tænastur, t.d. frítíðartilboð hjá kommununum. Eisini verður víst á prísskipanina hjá Strandferðsluni sum dømi. Í almenna orðaskiftinum er vorðið greitt, at ætlanin er at brúka samleikakortið sum amboð til at seta í verk eina nýggja prísskipan, ið býtir ferðafólk upp í 3 bólkar: 1) fastbúgvandi á útoyggj, 2) føroyingar annars og 3) útlendsk ferðafólk.

Ein partur av endamálinum við samleikakortinum er soleiðis at geva myndugleikum eitt amboð til lættari at kunna málrætta prísskipanir eftir aldri og/ella bústaði hjá teimum ið brúka ymiskar tænastur ella veitingar. Hetta kann vera ynskiligt ella skilagott í ávísum førum, t.d. at búsitandi á útoyggj skulu fáa lagaligari treytir við samferðsluni, tó at tað eisini eru aðrir mátar at røkka hesum endamáli enn at menna eina nýggja app.

Samleikaprógv kunnu við øðrum orðum vera hent, tá serskipanir fyri útvaldar samfelagsbólkar skulu handhevjast. Tað er tó ein heilt annar og meiri prinsipiellur spurningur, tá tað snýr seg um at brúka prógvið sum eitt amboð til at "raka" ávísar bólkar ella brúkarar av eini tænastu, einans grundað á teirra samleika; at skilja fólk búsitandi í Føroyum frá teimum sum ikki búgva her. Tá koma vit beinanvegin inn á spurningar um, hvat ein føroyingur er, hvør rindar skatt hvar, vánaligari vinnuligar fortreytir fyri útjaðaran, hvat hetta ger við okkara "image" sum ferðafólkaland, hvussu hetta skal umsitast í praksis, hvar hetta steðgar osv.

Samleikaprógv og samferðsla
Halda vit okkum til dømið við Strandferðsluni, so eru flest øll samd um, at tað er skilagott at dagføra prísskipanina og at tað er upplagt, at ferðavinnan í alsamt størri mun verður við til at fíggja raksturin av

okkara almenna samferðslukervi, bæði óbeinleiðis við stóra ískoytinum ferðavinnan longu hevur til landsbúskapin, men eisini beinleiðis við brúkaragjøldum. Tað er ein partur av endamálinum við ferðavinnuni. Vit meta tó at tað eru skilabetri hættir at røkka hesum endamáli enn við eini prísskipan ið er grundað á samleika kundans.
Prísskipanin er eitt týðandi amboð, tá tað snýr seg um at stýra atferðini hjá fólki. Vanliga loysnin er at velja eina prísskipan, sum gevur teimum ið brúka tænastuna nógv ein avsláttur, t.d. við einum árskorti, meðan tey sum bara fara einstakar túrar, rinda eina aðra upphædd. Tað er eisini møguligt at brúka prísskipanina til at stýra, nær onnur ferðandi enn pendlarar velja at ferðast, t.d. við at gera ferðaseðlakostnaðin eitt vet bíligari uttanfyri háferðslutíðina. Afturat hesum ber síðani til at gera serskipanir fyri útvaldar samfelagsbólkar, t.d. fyri fastbúgvandi á útoyggj. Í okkara parti av heiminum er ikki vanligt at gera mun á fólki grundað á tjóðskap ella onnur slík samleikaeyðkenni og vit halda heldur ikki tað er hóskandi ella serliga dámligt, fóru Føroyar tann vegin.

Í frágreiðingini um Strandferðsluna, "Strandferðslan frameftir", sum varð handað landsstýrinum í mars 2022, stendur m.a. hetta at lesa um evnið: "Prísskipanin hjá Strandferðsluni má soleiðis kunna skilja ímillum tey ferðandi, soleiðis at ferðafólk og fyri so vítt onnur fólk, sum sjáldan ferðast á leiðunum hjá Strandferðsluni, í miðal rinda meira fyri hvørja ferð enn tey, sum regluliga ferðast, t.v.s. ein atferðarstýrd avsláttrarskipan."[1]
Visit Faroe Islands tekur undir við hesi niðurstøðu, sum ikki bara hevði rokkið endamálinum um at fáa fleiri inntøkur frá ferðavinnuni, men samstundis eisini hevði eggja fleiri at brúkt frálíku samferðslumøguleikarnar í Føroyum heldur enn bilin. Harafturat er ein atferðarstýrd prísskipan sum útgangsstøði eisini lættari og bíligari at umsita.

Avleiðingar av lógaruppskotinum
Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður sagt, at talgilda samleikaprógvið ikki verður mett at hava avleiðingar fyri serstøk øki í landinum, vinnuna ella umsitingina hjá landi og kommunum. Heldur ikki verður mett, at lógaruppskotið hevur við sær markaforðingar.
Tað er møguliga so, at lógaruppskotið í sær sjálvum ikki hevur nakrar slíkar avleiðingar. Hinvegin kann nýtslan av samleikakortinum, ið uppskotið heimilar, hava neiligar avleiðingar fyri øll hesi øki.

Ein differentierað prísskipan hjá m.a. Strandferðsluni, ið ger mun á fólki eftir bústaði, kann ávirka kappingarstøðuna hjá vinnuligum veitarum innan ferðavinnuna og aðra tænastuvinnu í útjaðaranum, serliga á útoyggj, har ferðavinna oftani er einasti vinnuligi møguleikin afturat landbúnaðinum. Málið í menningarætlanini hjá Visit Faroe Islands um at menna ferðavinnuna um alt landið, so flest møguligt fáa ágóðan av hesi nýggju vinnu, verður harvið verri at røkka.

Tá tað snýr seg um umsitingarliga partin, so verður í uppskotinum sagt, at kortið ger, at umsiting hjá landi og kommunum kann fara frá manuellari handfaring og at hetta tí kann elva til umsitingarliga effektivisering. Víst verður tó ikki á, hvørjar manuellar skipanir verða avloystar við kortinum og hvar hendan effektiviseringin ítøkiliga kann finnast. Verða nýggjar skipanir settar í verk, sum við støði í

[1] "Strandferðslan frameftir – niðurstøður frá arbeiðsbólki" (Mars 2022), s. 27: http://tilfar.lms.fo/logir/alit/2022.03%20Strandfer%C3%B0slan%20framfeftir%20-%20ni%C3%B0urst%C3%B8%C3%B0a%20fr%C3%A1%20arbei%C3%B0sb%C3%B3lki.pdf

samleikakortinum grunda tænastuna á bústað ella aldur, er neyðugt at handhevja og hava eftirlit við skipanini, tað veri seg talgilt ella manuelt og tað kostar altíð. Óbeinleiðis kann uppskotið tískil hava við sær umsitingarligar kostnaðir av at handfara nýggj markamót, sum vit ikki hava í dag.

Føroyar hava í nógv ár verið partur av arbeiðinum hjá Norðurlandaráðnum, ið snýr seg um at taka burtur markaforðingar millum londini. Elvir eitt nýtt samleikakort til at vit nú fara undir at seta í verk serskipanir í Føroyum, ið gera mun á fólki grundað á bústað, so er vandi fyri, at uppskotið nettupp elvir til nýggjar markaforðingar, ið ger tað meiri tvørligt hjá øðrum norðurlendingum at ferðast í Føroyum. Í øllum førum er hetta nakað, ið eigur at vera kannað nærri. Norðurlendingar umboða uml. 2/3 av ferðafólkunum sum koma til Føroya (her er cruise ikki talt við), so innan ferðavinnuna er hetta týðandi faktorur.

Verður tað ein hevdvunnin skipan í Føroyum, at tænastuveitingar og prísir verða grundaðir á fasta bústaðin hjá honum ið keypir tænastuna, ikki bara við Strandferðsluni, men kanska sum frá líður eisini fyri at vitja søvnini, í svimjihallum, býarbussum, á skoytibreytini ella fyri at ganga sær ein túr í haganum, so kann samleikaprógvið potentielt hava stórar neiligar avleiðingar fyri ferðavinnuna og altjóða ímyndina og umrøðuna av Føroyum sum heild.

Vit hvørki vóna ella vænta, at hetta verður soleiðis í Føroyum, men tað skerst ikki burtur, at hetta er ein vandi, ið eigur at vera viðgjørdur ísv. uppskotið.